# WWW.veðurtíðindi



LIS MORTENSEN
JARÐFRØÐISSAVNIÐ

***Hetta er eitt tulkað veðurkort fyri tey, sum eru forvitin og vilja læra meir um veðrið. Her sæst ein partur av Norðuratlantshavi, har hátrýst og lágtrýst eru teknað á myndina og kunnu berast saman við fylgisveinamyndina. Aftur at hesum ber til at fáa »veðurtíð-indini« á enskum.***



## ONNUR ÁHUGAVERD STØÐ Á INTERNETINUM UM »VEÐUR OG VIND«:

Veðurtíðindi frá donsku veðurstovuni DMI um Føroyar:
http://www.dmi.dk/vejr/faro/femfaro.txt.html

Veðurtíðindi úr Íslandi:
http://theyr.com/cg/cny/NA

Veðurtíðindi úr Íslandi um Føroyar:
http://theyr.is/cg/cny/ld2a1d/F=js*s*010918*13*FAE*is_Reykjavik

Veðurkort fyri Norðuratlantshav:
http://www.uni-koeln.de/math-nat-fak/geomet/meteo/winfos/ukmetof/last_00.gif

Veðrið uppi á Sornfelli:
http://www.metsupport.dk/data/sornfelli/last2days.htm

Veðurmátingar frá Landsverkfrøðinginum:
http://www.lv.fo/fr/fel/lv.htm

Vit tosa um veður og vind, – í orðsins rætta týdningi. Hvussu man fara at viðra? Ber til at fara á flot? Kunnu klæðini heingjast út á snór í dag? Nær er ein góður dagur at ganga fjøllini?

Hvønn dag fáast veðurtíðindi bæði úr útvarpi, sjónvarpi og bløðum við veðurforsøgnum næstan eina viku fram í tíðina. Og ikki minst á internetinum legst til við støðum, har til ber at leita sær upplýsingar um veðrið júst nú og forsagnir fyri komandi veður.

Fleiri ferðir um samdøgrið ber til at fáa eina fylgisveinamynd yvir Norðuratlantshavið frá fylgisveinastøðini í Dundee á adressuni: http://www.sat.dundee.ac.uk/
Ein skal tekna teg sum brúkara av myndunum (hetta er ókeypis), og soleiðis fæst atgongd til fylgisveinamyndirnar. Hvønn dag eru umleið 8 dagligar fylgisveinamyndir at fáa, og til ber at leita eftir eldri myndum eisini.

Tað kann vera trupult skilja fylgisveinamyndina. Leitið tá til: http://www.metoffice.com/education/data/analysis.html#